# Heini fekk 4 mál í Helsingør-sigri

Liðið hjá Heina Hanusarsyni og Róki Akralíð var á vitjan í Suðurjútlandi í gjár. Helsingør vann dystin ímóti Tønder við 25-22. Heini Hanusarson skeyt 4 mál í dystinum. Rókur Akralíð fekk einki mál. Helsingør eru nú nr. 7 av teimum 14 liðunum í næstbestu donsku mansdeildini í hondbólti. Helsingør hevur nú 7 stig fyri 6 dystir.



# Kanna óreglusemi

Liðini, BMW Sauber og Williams vórðu eftir koyringina á Interlagos í Brazil, kannaðir fyri óreglusemi í brennievninum, men teir vórðu tó fríkendir av FIA. Men eftir fleiri tímar av samráðingum varð avgjørt, at prógvini vóru ikki nóg góð, og at liðini tessvegna skuldu fríkennast. McLaren liðið ætlar tó ikki at lata tað fara stillisliga aftur við borðinum, teir hava ætlanir um at kæra avgerðina. Fær McLaren veðhald í sínum kærum, kann tað broyta raðfylgjuna á givnum heiðursmerkjum. Og so kann ungi bretin Lewis Hamilton gerast heimsmeistar longu í síni fyrsta kappingarári.

# U17 dreingir skulu royna seg

**Føroyska U17 fær harða mótstøðu í EM-undankappingini, sum liðið skal spæla í Týsklandi hesa vikuna**

U17
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað verður ikki smávegis mótstøða, sum føroyska U17 dreingjalandsliðið í fótbólti fær, tá ið liðið fer at spæla EM-undankapping í Týsklandi.

Móstøðuliðini verða Týskland, Svøríki og Rumenia. Týskland er bronsuvinnari í HM, Svøríki er norðurlendskur meistari, og Rumenia hevur eitt rættiliga sterkt lið eisini.

Ferðalagið U17 spælarunum fer av landinum í morgin, og næstu vikuna fara teir at halda til í Nørdlingen.

Fyrsti dysturin verður hósdagin, og tá eru týsku vertirnir mótstøðuliðið. Leygardagin skulu Føroyar spæla ímóti Rumenia, og so verður seinasti dysturin týsdagin í næs tu viku, og tað stendur Svøríki á skránni.

Pætur Clementsen og Finn Johannesen eru venjarar hjá U17 landsliðnum, og teir hava tikið hesar spælarar út til EM-hópin: Teitur Gestsson, Dánjal Pauli Lervig, Sørmund Kalsø KÍ, Hanus Mortensen, Heini Vatnsdal, Gilli Sørensen, Hugin Albinus, Mikal Jespersen VB/TB, Hallur Hansson, Kristin R. Mouritsen, Rógvi Sørensen HB, Róaldur Jacobsen B36, Monrad H. Jacobsen NSÍ, Bjarti Hansen FS Vágar '04, Viljormur Davidsen OB, Karl Løkin Randers FC, Jógvan Rói Davidsen ÅB, Jóan Símun Edmundsson Esbjerg BK.

# GÍ tosar við svia

**GÍ hevur um vikuskiftið tosað við svenskan venjara um møguligt samstarv næsta kappingarár**

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*



*Andrias Poulsen, formaður í GÍ, og Stefan Hansson hugdu eftir dysti hjá GÍ í gjár*

Um vikuskiftið hevur svenskarin Stefan Hansson verið á vitjan í Gøtu. Hann hevur virkað sum venjari og spælari í Svøríki, Danmark og USA, og nú er upp á tal, at hann skal gerast venjari hjá GÍ næsta kappingarár.

Venjarin í ár, Petur Mohr, hevur boðað frá, at hann heldur ikki fram, og tí leitar GÍ eftir nýggjum venjara.

Stefan Hansson hevur sjálvur tikið stig til at koma til Føroya at hyggja eftir umstøðum hjá GÍ, og í gjár var hann vitni til Formuladystin millum GÍ og Skála í Gøtu. Hann náddi júst at koma til Gøtu, áðrenn dysturin varð brikslaður í gongd í Sarpugerði, og Stefan má sigast at hava fingið eina sanna fótbóltsuppliving, tí GÍ hamraði 5 mál ígjøgnum hjá Skála hendan sunnudagin.

Formaðurin í GÍ, Andrias Poulsen, sigur, at felagið er í samráðingum við Stefan Hansson, men at aðrir venjarar eru eisini upp á tal, og at eingin endaliga avgerð er tikin um venjaraspurningin enn.

## FAKTA

**AB-B71 0-1 (0-0)**
**0-1: Símin Hansen, 63.**
**Dómari:** Dagfinn Olsen
**AB:** Heðin Stenberg – Rani D. Christiansen, Morten Overgaard, Rógvi Holm, Pætur T. Jørgensen - Bjarni Jørgensen, Fróði Clementsen (Hanus Jacobsen, 76.), Høgni M. Joensen, Rógvi Poulsen – Jón Nielsen, Dion Jacobsen (Jónas Stenberg, 70)
**B71:** Símin Rógvi Hansen – Magnus Olsen (Tummas Clementsen, 70.), Fabio Vieira, Anders Rasmussen, Johannes Jensen – Mikkjal T. Hentze, Flavio Lucio Silva de Santana, Vellington Soares, Gudmund S. Nielsen – Símin Hansen, Høgni Midjord (Jón Koytu Petersen, 83.)

**HB-KÍ 1-1 (0-0)**
**0-1: Símun Joensen, 56.**
**1-1: Andrew av Fløtum, 86.**
**Dómari:** Páll Augustinussen
**HB:** Tróndur Vatnhamar – Mortan úr Hørg, Hans á Lag, Vagnur Mortesen, Rasmus Nolsøe – Tór-Ingar Akselsen, Milan Kulic (Rókur av Fløtum, 64.), Kári Nielsen, Páll M. Joensen (Emil Nolsøe Leifsson, 83.) – Andrew av Fløtum, Rógvi Jacobsen
Gult kort: Andrew av Fløtum, Kári Nielsen
**KÍ:** Meinhardt Joensen – Høgni Madsen, Jan Andreasen, Kaj Ennigarð, Harley Bertholdsen – Gunnar Nielsen, Kristoffur Jakobsen, Kristian á Lakjuni, Símun Joensen, Heðin á Lakjuni – Paul Clapson
**Gult kort:** Meinhardt Joensen, Kaj Ennigarð, Høgni Madsen, Gunnar Nielsen
**Reytt kort:** Paul Clapson, 71.

**EB/Streymur – B36 4-2 (2-2)**
**Hanus Eliasen 3.**
**Hanus Eliasen 15.**
**2-1 Jóhan V. Gunnarson 23.**
**2-2 Sylla D. Ahmed 39.**
**3-2 Arnbjørn Hansen 74.**
**4-2 Karoly Potemkin 90.**
**Dómari:** Petur Reinert
**EB/Streymur:** René Tórgarð – John Heri Dam, Marni Djurhuus, Egil á Bø, Bárður Olsen – Hans Pauli Samuelsen, Símun Eliasen, Ronnie Samuelsen (Jákup M. Joensen, 90.), Hanus Eliasen (Rafael Kwieczinski, 87.), Sorin Anghel, Arnbjørn Hansen (Karoly Potemkin, 80.)
**Gult kort:** Arnbjørn Hansen, Bárður Olsen, Ronnie Samuelsen, Rafael Kwieczinski
**B36:** Jákup Mikkelsen – Jóhan V. Gunnarson, Fróði Benjaminsen, Herbert í Lon Jacobsen, Kenneth Jacobsen – Bergur Midjord, Oddmar Færø (Anderson Castilho, 77.), Ingi Højsted, Heini í Skorini, Hanus Thorleifsson – Sylla D. Ahmed
**Gult kort:** Bergur Midjord

**GÍ-Skála 5-0 (3-0)**
**1-0 Hans Jørgin Djurhuus, 20.**
**2-0 Christian Lundbjerg, 29.**
**3-0 Sam Jacobsen, 36.**
**4-0 Christian Lundbjerg, 56.**
**5-0 Hendrik Rubeksen, 68.**
**Dómari:** Rúni Gaardbo
**GÍ:** Geza Turi - Jónreid Dalheim, Niclas Niclassen, Atli Gregersen, Pól Jóhannus Justinussen - Hans Pauli Petersen, (Tomas Sajdak, 65.), Símin Luis Jacobsen (Magnus Skoralíð, 65.), Sam Jacobsen, Hans Jørgin Djurhuus - Christian Lundbjerg (Jan Poulsen, 75.), Hendrik Rubeksen
**Skála:** Predag Markovic - Bárður Danielsen, Petur Pauli Mikkelsen (Eliesar Olsen, 87.), Rúni Rasmussen, Teitur R. Joensen - Erland B. Danielsen, Pætur D. Jacobsen, Levi Hansen, Bogi Gregersen, Debess Danielsen (Poul N. Poulsen, 62.) - Obi Obele (Pauli G. Hansen, 71.)
**Reytt kort:** Teitur R. Joensen, Skála

**NSÍ - VB/Sumba 3-1 (2-1)**
**1-0: Jonhard Fredriksberg, 4.**
**2-0: Sjálvmál, 12.**
**2-1: Marco Moravsic, 27.**
**3-1: Christian Høgni Jacobsen, 85.**
**Dómari:** Ransin Napoleon Djurhuus
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen - Pól Thorsteinsson, Óli Hansen, Johan Troest Davidsen, Einar Hansen - Bogi Løkin (Øssur Dalbúð, 78.), Sjúrður Jacobsen, Jústines R. Hansen - Hjalgrím Elttør (Andy Olsen, 76.), Jónhard Frederiksberg, Christian Høgni Jacobsen (Jan Martin Mortensen, 80.)
**Gult kort:** Christian Høgni Jacobsen, Øssur Dalbúð
**VB/Sumba:** Vlada Filopovic - Súni úr Hørg, Dimitrije Jankovic, Martin Tausen, Jónar Dahl - Teitur Tausen, Dánjal Johan Joensen (Jacob Skaaning, 75.), Aco Pandurovic, Birni Kjærbo (Janus Kjærbo, 85.) - Marko Moravsic, Jón Krosslá Poulsen
**Gult kort:** Súni úr Hørg, Martin Tausen, Aco Pandurovic, Janus Kjærbo

**Formuladeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1. NSÍ | 26 | 19-3-4 | 50-22 | +28 | 60 |
| 2. B36 | 26 | 15-7-4 | 47-21 | +26 | 52 |
| 3. EB/Str | 26 | 16-3-7 | 54-32 | +22 | 49 |
| 4. HB | 26 | 14-4-8 | 57-34 | +23 | 46 |
| 5. GÍ | 26 | 10-5-11 | 42-41 | -9 | 35 |
| 6. KÍ | 26 | 9-5-12 | 42-45 | -3 | 32 |
| 7. B71 | 26 | 9-5-12 | 38-35 | -7 | 32 |
| 8. Skála | 26 | 9-4-13 | 25-40 | -15 | 31 |
| 9. AB | 26 | 4-5-17 | 30-53 | -23 | 17 |
| 10. VB/S | 26 | 2-5-19 | 25-67 | -42 | 11 |